## Sjáldsamur fuglur

Bara tríggjar ferðir er hann sæddur í Føroyum áður. Hesar seinastu dagarnar er ein øssvartur lómur, ein Gavia arctica á fakmáli, sæddur á Sandsvatni, skrivar www.faroenature.net. Hesin er eitt annað slag enn okkara vanligi lómur, sum eitur Gavia stellata, og hann er sera sjáldsamur í Føroyum. Við vissu er hann bara eina einans ferð sæddur í Føroyum fyri 1950 og tvær ferðir eftir 1950. Øssvartur lómur líkist nógv lómi, men er nakað størri. Í summarbúna er hann týðiligari svart og hvítur, meðan lómur er meira gráur. Bæði í vetrar- og summarbúna er hann hvítur aftarlaga upp í liðirnar. Men vit hava onga mynd av sjáldsama gestinum, so vil nakar síggja hann, er bara at skunda sær á Sandsvatn.



## Fólkatónleikur kring landið

Í ár fevnir fólkatónleikastevnan um konsertir og dansikvøld við Gjógv, í Hósvík, Kirkju, Hattarvík, Runavík, Mykinesi og í Havn. Eisini er samstarv við G!-festivalin, so at nakrir bólkar úr fólkatónleikastevnuni eisini spæla har. Luttakandi bólkar og solistar eru: Dánjal á Neystabø, Kiezelmayer, Katrina Petersen,Ingun Simonsen, Markamót, Kvonn, Guðrið Hansdóttirog Budam. Eisini eru Folk Sessions í Hafnia Lounge sunnudagar í summar. Tað er Føroya Fólkatónleikarafelag, sum stílar fyri stevnuni. Fólkatónleikastevnan, ið heldur fram til 23. juli, varð fyrstu ferð hildin í 1984.

# Mugu bæði skerja og friða

**Fær formaðurin í vinnunevndini hjá Løgtinginum sín vilja, verða fiskidagarnir næsta ár skerdir upp í 5%, samstundis sum Føroya Banki verður fullkomiliga friðaður**

FISKIDAGASKIPAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit eiga bæði at skerja fiskidagarnar og at friða Føroya Banka fyri øllum fiskiskapi.

Tað heldur Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum.

Hann sigur, at tað avgerðandi neyðugt at fara væl um Føroya Banka, tí tá ið hann er á væl fyri, er hann eitt rættiligt gullnám hjá samfelagsbúskapinum.

Men nú er hann illa fyri og tí eiga vit at friða hann, sigur Henrik Old.

Hann sigur, at verður Føroya Banki friðaður í ár, ber til at lata onkrar smáar snellubátar gera nakrar royndir á Bankanum fyri at vita, hvussu til stendur. Í so máta ber til at fylgja við gongdini. Eftir tað, kann so støða takast til framhaldandi friðingar.

- Afturmeldingar, vit fáa, eru tær, at tann fiskur, sum er, er í góðum standi og enntá í betri standi enn í fjør.

- Sostatt er tað ikki føði sum manglar. Tað er bara ov lítið til, sigur formaðurin í vinnunevndini.



*Upsan eiga vit at lata fáa frið, men serliga toskurin má skerjast og verjast, heldur formaðurin í vinnunevndini hjá Løgtinginum*

### Skerja 2%-5%

Annars sigur hann, at hann hevur altíð verið talsmaður fyri at gera leypandi, men smáar tillagingar í fiskidagaskipanini.

Og í ár heldur hann, at vit eiga at skerja fiskidagarnar eini 2%-3% og um skerjingin so verður 5% er tað eisini til at liva við.

Hinvegin er verður ikki mælt til at gera nakað við upsan og so er ongin orsøk at skerja tann fiskiskapin.

- At gera kollveltandi broytingar í einum, hevði verið ein vanlukka, tí tað fer at raka virki og arbeiðspláss hart

### Høpisleyst tvætl

Men tilmælið um at nokta fólki at fara í fjørðin at fáa sær eitt kók, kallar hann skilaleyst og meiningsleyst.

- Tað er púra onki høpi í slíkum, so tað tilmæli frá sakkunnleikanum hevur ongan livandi møguleika at vinna frama, sigur hann.

-Tað sum, hesir bátarnir fiska, er ikki meir enn tað, eitt skip fiskar ein fyrrapart. Men vit mugu ikki gloyma, at rætturin at fara í fjørðin at fáa sær eitt kók, er ein av fyrimununum, vit hava við at búgva her, tí avmarkingarnar eru nógvar við at liggja mitt í Atlantshavi. Taka vit fyrimunirnar hjá vanligum fólki burtur, kunnu tey akkurát tað sama bara rýma og so er lítið vunnið.

Tí skulu vit heldur hugsa um at brúka kreftirnar upp á teir veruligu trupulleikarnar, heldur enn upp á slíkt tvætl, sigur Henrik Old.

# Minka flotan

**Henrik Old heldur, at vit eiga at umhugsa at gera eina skipan, so at tað ber til hjá vinnulívsfólki at sleppa av við skip á ein virðiligan hátt**

UPPHØGGINGARSTUÐUL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sum tað sæst í aðrari grein, heldur Henrik Old, at tað er neyðugt at skerja fiskidagarnar.

Men samstundis staðfestir hann, at ein stórur trupulleiki er, at nøkur stór línuskip sluppu inn í flotan umvegis útróðrarflotan.

- Tað hevur verið ein stórur trupulleiki síðani.

Henrik Old heldur, at vit eiga at finna eina skipan fyri at minka um línuflotan aftur, so at hann kemur niður aftur á eitt passaligt støði. Tað eigur serliga at verða gjørt, verður skerjingin næsta ár 5%, ella okkurt sovorðið.

- Vilja vit minka ávísar skipabólkar, eru ymsir mátar.

- Ein máti er at skerja fiskidagarnar, tí so tvingar tað bátar at keypa aðrar bátar og sostatt hvørja teir úr flotanum

Men tað er avgjørt ein loysn at keypa skip úr flotanum. Tað kann gerast við at allur flotin betalir eitt ávíst serligt gjald upp á 5-10 oyru fyri kilo, tey avreiða, í ein grunn, sum síðani kann brúkast at keypa bátar úr flotanum.

- Fáa vit minka flotan eitt ella tvey skip um árið, er tað eitt stórt framstig og tað er væl trúligt, at reiðarar høvdu sæð hetta sum ein máta at sleppa burturúr vinnuni upp á. Ein stórur trupulleiki er nevniliga at gera skipanir, so at reiðarar sleppa burturúr vinnuni á ein virðiligan hátt, sigur Henrik Old og soleiðis kundi tað borið til at minka flotan í góðum samstarvi.

- Skulu vit skerja fiskiskapin eftir toski og hýsu 5%, mugu vit eisini finna onkra skipan, sum hesa, fyri at minka um flotan, so at vit sleppa undan, at tað pínur ov illa.

Hinvegin útihýsir hann møguleikanum at skipa fyri einum almennum upphøggingarstuðuli einaferð afturat.

# Leita eftir semu í næstu viku

**Tað verður ógvuliga torført at semjast um fiskidagarnar og toskafiskiskapin næsta ár, men í næstu viku fer samgongn at royna at finna semju**

FISKIDAGASKIPAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Enn er ongin semja í samgonguni um fiskidagaskipanina næsta ár.

Longu um knappar 14 dagar, á ólavsøku, skal landsstýrismaðurin leggja uppskot fyri Løgtingið talið á fiskidøgum næsta fiskiár, sum byrjar 1. september.

Men samstundis skal støða eisini takast til, hvussu verður við toskafiskiskapinum næsta ár, eftir at fakligu tilmælini hava mælt til mestsum at halda uppat at fiska tosk.

Tað er kanska ikki so løgið, at ongin semja er fingin í samgonguni enn, tí enn eru ongar royndir gjørdar at finna semju.

Men tað verður eitt arbeiðið, sum samgongan fer undir nú í vikuni, sum kemur.

Fólk vóru so smátt farin í summerferiu, tá ið fakligu tilmælini komu og tí hevur ikki borið til at savna troppiarnar aftur, fyrrenn nú.

Henrik Old, formaður í vinnunevndini staðfestir, at tilmælini frá sakkunnleikanum um skerjingar, eru so mikið víttgangandi, at hann væntar, at tað verður ógvuliga torført at finna semju.

- Uppgávan verður serliga torfør í ár, tí tilmælini um skerjingar eru víðgongdar, heldur hann. Tað ger tað ikki minni torført, at valár er, tí tá kunnu politikarar vera serliga varnir við at skerja.

### Mugu vísa styrki

Hinvegin heldur hann, at tað er neyðugt, at samgongan nú vísir styrki og finnur eina semju um ein hóskandi niðurskurð.

- Tað hevði verið eitt gott tekin at víst úteftir, at vit megnaðu at finna eina forsvarlig semju, hóast uppgávan er torfør, sigur hann.



*Tað er nú, at vit skulu vísa styrki, heldur Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum.*

- Men tað er í eini støðu sum hesari, við víðgongdum tilmælum og vali fyri framman, at vit eiga at vís okkara styrki. Vit mugu ásanna, at tað er neyðugt at gera nakað og lata vit standa til, er tað eitt øgiligt veikleikatekin og so hevur fiskidagaskipanin fingið eitt rættiligt skot fyri bógvin, sigur Henrik Old.